




# 300.000



Val

TÓRBJØRN JACOBSEN
Tjóðveldi

Hondbólturin hevur eftir øllum at døma fingið eina renæssancu. Eftir eitt óstøðugt tíðarskeið, er landsliðið komið innaftur á kyrrari sjógv. Dysturin leygardagin ímóti serbum bar týðilig prógv um tað. Eitt sjaldsama væl samansjóvað lið. Kemiin perfekt. Ein fyri allar og allir fyri ein. Orkan gekk kanska undan seinastu 5 minuttirnar, men tað var ein fragd at síggja, hvussu væl allar fasettirnar riggaðu. Einsæris og saman. Verjan sum betong og støðuga skothóttanin uttaneftir frá Sveini, Heina og Róki gav smærru monnunum møguleikan at varta upp við superbum delikatessum, ið sum oftast góvu úrslit. Og málmenninir vóru sannir brandar. Júst hendan dagin hevði sjálvt Marian Cirloganesco ikki staðið teimum báðum kurl, Skipagøtu og Black.

Hetta fekk okkum áskoðarar at minnast aftur á m.a. C-Heimsmeistaraskapið í 1980, sum spælt varð um í Føroyum. Fleiri av londunum ið vóru við ta ferðina, hava nú ment seg upp í heimselituni. Ímeðan hava vit ligið í andaleypi, í stóran mun orsakað av fíggjarligu umstøðunum hjá Hondbóltssambandinum. Landsliðshondbólturin er alneyðugur, skulu vit hugsa um at menna hesa ítrótt. At savna kremið til sparring við aðrar heimsins tjóðir, dregur við vissu alt støðið upp í føroyskum hondbólti. Hartil hava leikararnir eitt annað mál enn bara at vinna á grannabygdini í vikuskiftinum. Paralellurin er fótbólturin, ið meira enn nakað annað einstakt fyribrigdi hevur sett tjóðina á heimskortið, og føroyskir fótbóltsleikarar eru vorðnir dugnaligari hesi árini, vit hava verið partur av heimsmeldrinum. Ein orsøkin til hesa framgongd er, at politiska skipanin raðfesti Fótbóltssambandið á løgtingsfíggjarlógunum júst í sambandi við landsliðini.

Nú mín gamli liðfelagi frá Neista-tíðini, í fyrru helvt av sjeytiárunum, Kristian Johansen, tykist hava fingið botnin aftur, og lagt hetta sersambandið á kós við framskrúvu, saman við sínum nevndarteknum og øðrum góðum fólki, er alneyðugt, at kontinuitet-urin verður hildin. Umboðini hjá Tjóðveldinum í løgtingsins mentanarnevnd, Heidi Petersen og undirritaði, mæltu í heyst fíggjarnevndini til at játta Hondbóltssambandi Føroya kr. 300.000 til at reka landsliðsarbeiðið fyri. Táið løgmaður skrivaðu út nýval, hvarv hetta tilmælið saman við øllum øðrum málum, sum lógu í tinginum og tess nevndum. Man skal ansa sær, at lova nakað sum helst í einum valstríði, men hetta tilmælið er skjalafast, og flokkurin fer at halda fast um hesa støðuna, táið tingið kemur saman aftur, og ein nýggj fíggjarlóg skal smíðast. Nú mega vit ikki missa landsliðið og menning tess á gólvið einaferð enn. Tað skylda vit ungdómunum, ið nýta so nógva orku í landsins hallum kvøld eftir kvøld, vikuskifti eftir vikuskifti. Eykavinningurin er positiv promovering av eini heilari tjóð.

Í kvøld verður leikt ímóti Ísrael. Tað er við spenningi, at bíða verður eftir byrjunarbríkslinum. Megna tit at halda stílinum frá leygardegnum, har tit so fyrimyndarliga spældu fyri hvørjum øðrum, liðnum og móðurlandi tykkara, so átti møguleikin fyri einum góðum úrsliti at verið til staðar. Heldur hendan gongdin fram, so kundi tað eisini hent seg, at Sjónvarp Føroya varnaðist, at tað fanst eitt manslandslið í hesum landinum. Seinast sóust næstan bara fólk úr klassisku hondbóltsbygdunum og úr Havn á lektarunum, og tað hevði kanska ikki gjørt nakað, um fólk kring landið fingu undirhald í hasum klassanum inn í sínar stovur. Tað hava lisensgjaldararnir undir øllum umstøðum uppiborið. Góða eydnu í kvøld og frameftir.

**www.dimma.fo/Bloggan/torbjorn.jacobsen**

# Fokus uppá uttanríkismál



Val

POUL MICHELSEN
Fólkaflokkurin

Fólkaflokkurin vil vinna Føroyum veruliga uttanríkispolitiska ávirkan. Stovnast skal uttanríkismálaráð við landsstýrismanni og sendistovum. Vit skulu reka okkara egna uttanríkispolitikk við fullari ábyrgd, tá føroyingar í framtíðini velja at gerast sjálvstøðug tjóð.

Føroyar fara við uttanríkismálaráðnum á odda at skapa sær neyðugu fyritreytirnar fyri at føroyskt vinnulív og føroyingar annars kunnu luttaka í teimum avbjóðingum og ikki minst inntøku- og menningarmøguleikum, ið alheimsgerðin hevur við sær. Tí tað er úti í heimi stóru vakstrarmøguleikarnir eru.

Vit skulu útbúgva okkara egna diplomatlið, sum skal manna sendistovur kring um í heiminum.

Vit eiga skjótast gjørligt at opna sendistovur í USA, Russlandi og Kina.

Føroyar eiga at samráðast við ES um tey fýra frælsini. Tey eru frælsur flutningur av vørum, tænastum, kapitali og persónum millum lond.

Í búningarrtíðini skulu vit brúka royndirnar av Íslandssáttmálanum, trároyna EFTA limaskap og byrja samráðingar við ES um tey 4 frælsini.

Tað vil Fólkaflokkurin.

# Tað sum eg ikki fekk sagt í beinleiðis svf



NITA NÆS
Javnaðarflokkurin

Til hetta valið tosa allir flokkar um vælferð.

Vælferð er eitt Socialdemokratiskt orð, sum merkir: at felagskapurin skal taka sær av øllum limum sínum.

Tá aðrir flokkar tosa um vælferð, og samstundist ikki leggja sama týdningin í orðið, so siga politikarar ósatt fyri okkum, tí tað er skeiv at billa fólki inn, at allir føroyskir politiskir flokkar byggja sín politikk á eitt sosialdemokratistk fyribrygdi.

Vælferðin kemur ikki av sær sjálvari.

Sum valevni javnaðarfloksins haldi eg: **at vælferð er bara verulig vælferð, um hon røkkir heilt út til tey, sum hava brúk fyri henni**.

Vit kunnu gott hava ríkidømi og vælstand, uttan at hava veruliga vælferð.

Hóast vit í dag brúka ¾ av fíggjarlógini til tað, vit vanliga deila upp í bleyt virði og vælferð. So uppliva vit alt ov ofta, at menniskju sum hava brúk fyri hjálp, brúk fyri vælferðini, at tey enda sum ein sak í bløðunum ella hjá landsstýrismanninum, áðrenn tey kenna, at tey eru ein natúrligur partur av vælferðini.

Og tá tey so fáa hjálp, skulu tey ikki bert vísast á møguleikar - tey skulu hava tryggjaði lógarfest rættindi.

Tað eru menniskju og bólkar í Føroyum, sum ikki megna at rópa nóg hart upp um, at tey hava brúk fyri vælferðartænastum.

Fyri eitt barn við skerdum førleika kann vælferð merkja nakað so einfalt sum, at barnið fær tryggja rættindi at koma í ein heitan svimjihyl hvønn dag.

Beinavegin ein nýggj samgonga er skipað, skulu vit arbeiða fyri, at innlendismálaráðið fær gjørt tey lógarrættindini, sum ávísir samfelagsbólkar mangla í dag.

**Lógin fyri menningartarnða**

At endurgjaldsábyrgdarlógin verður sett í verk, so at sjúklingatryggingin kemur at virka

At arbeiðsskerdatryggingin kemur at virka

At psykiatrilógin aftur verður løgd fram fyri tingi

Vit mugu ásanna, at so leingi vit ikki hava hesar lógir, so standa hesir samfelagsbólkar sera veikir, og menniskju vilja koma í óvirðiligar støður í okkara annars peningaliga sterka samfelagi.

Javnaðarflokkurin hevur altíð havt vælferðina sum fremsta mál floksins, og vælferðin hjá flokkinum eigur altíð at byggja á samhaldsfasta grundsjónarmið floksins.

# Ferðavinna (1)



Val

ÓSKAR EIRIKSSON
Fólkaflokkurin

Vit skulu og mugu hava fleiri vinnulig bein at standa á. Hetta er ofta at hoyra millum manna, serliga á politiska pallinum, har menn og kvinnur sleingja um seg við gyltum lyftum.

Hetta er tó alt ov ofta ókeypis og ikki bindandi at sleingja út.

Vit mugu ásanna, at vit eru enn sum fyrr ein veiðumannatjóð, ja enntá ein útflytari av rávøru, eins og lond, vit ikki brýggja okkum um at samanbera okkum við.

Skulu vit menna okkum sum tjóð og halda fram við og menna okkara vælferðarsamfelag, má hendan binding gerast leysari.

Lat okkum byggja landið út, so tað gerst spennandi hjá ferðafólki at koma hendan vegin.

Lat okkum sláa fast, at nútíðar ferðamaðurin og kvinnan neyvan koma til Føroya bert til tess at anda okkara frísku luft niður í teirra lungu.

Tey krevja eina aktiva frítíð, har tey koma í samband við landið, tey vitja, á ein serligan og náttúrligan hátt.

Vit elska at samanbera okkum við okkara grannar. Serliga, tá tað passar inn í okkara egna kramm. Men her eru manglar, ja økir, har vit eru øldir aftan fyri okkara grannatjóðir.

Tí hyggja vit at, hvussu nógvir golfvallir til dømis eru í londunum uttan um okkum, ja, so mugu vit ásanna, at vit eru eftirbátur við lít.

Golfvinnan, tí tað er sanniliga ein stór vinna i heimshøpi, má fáa klárar ábendingar frá mynduleikum okkara. Teir mugu staðfesta, at hendan ítróttar- og ferðamannavinna fær somu sømdir sum aðrar ítróttargreinar.

Kross við Fólkaflokkin. Her virka vit!

Les meira á www.folkaflokkurin.fo